## Jol fær ein mánað

Eftir laku byrjanina hjá Tottenham í ensku Premier League ljóðar nú, at felagið er um at missa tolið við hollendska venjaranum, Martin Jol. Í enskum miðlum verður sagt, at venjarin nú fær ein mánað til at prógva, at hann framvegis er rætti maðurin at stýra felagnum. Hendan komandi mánaðin skal Tottenham spæla seks dystir. Tvær ferðir móti Anorthosis Famagusta í UEFA-Cup kappingini. Móti Middlesbrough í Carling Cup og móti Bolton, Aston Villa og Liverpool í Premier League.



## VB/Sumba-venjarin ákærdur

Predrag Prsic verður nú ákærdur av fútanum fyri harðskap. Hetta fyri tilburðin, tá hann í dystinum millum VB/Sumba og EB/Streym langaði til Hans Paula Samuelsen í løtunum eftir at gestirnir høvdu skorað sigursmálið. Í 3-2 í gjárkvøldið varð staðfest, at fútin hevur gjørt av at reisa ákæru í málinum. Hetta merkir samstundis, at passið verður tikið frá venjaranum. Verður hann funnin sekur, kann Prsic verða vístur av landinum.

# Keðilig koyring – spennandi úrslit



*Frá byrjan til enda vóru tað Ferrari bilarnir, ið drógu frá McLaren bilunum*

*Mynd: Polfoto*

**Í toppin á formil 1 heimsmeistaraheitinum eru nú einans tvey stig millum Hamilton og Alonso, og eftir at Alonso kroysti liðfelagan av breytini í fyrsta svingið, er forholdið millum báðar kappingarneytarnar ísakalt**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fernando Alonso er nú bert tvey stig aftan fyri liðfelagan Lewis Hamilton í kappingini um heimsmeistaraheitið í formil 1, við einum triðja plássi og Hamilton á fjórða plássi, át Alonso enn eitt stig burturav muninum teirra millum, og við einans trimum koyringum eftir, er heimsmeistaraheitið óvanliga spennandi.

Sjálv formil 1 koyringin í Belgia gjørdist annars rættiliga líti áhugaverd. Mest spennandi løtan var byrjanin, tá Hamilton var um at sleppa framvið liðfelaga sínum, men Alonso vísti, at hóast arbeiðsgevarin er tann sami, so er talan ikki um nakað vinarlag, og kroysti Hamilton av breytini. Hamilton megnaði tó at koma á aftur breytina og halda seg á fjórða plássi restina av koyringini.

### Ferrari heimsmeistari

Kimi Räikkönen í Ferrari var á odda frá byrjan til enda, og einasti maður, ið ivaleyst kundi bjóða Räikkönen av, liðfelagin, Felipe Massa, helt seg burtur, og tað tykist sum Ferrari hevur tikið avgerðina um, at í ár er Räikkönen besta vónin um heimsmeistaraheitið fyri koyrarar. Tað tykist tó rættiliga ósannlíkt, at Räikkönen, ið hevur 84 stig megnar at fáa bæði Hamilton við 97 stigum og Alonso við 95 stigum aftur í kappingini, nú einans 30 stig eru eftir at koyra um. Men við úrslitinum í gjár og kolldømingini av McLaren í liðkappingini, kann Ferrari liðið troysta seg við, at heimsmeistaraheitið fyri lið er teirra.

### Turt og keðiligt

Belgiska formil 1 koyringin á Spa Breytini plagar at bjóða ársins formil 1 koyring á nærum hvørjum ári. Við eini spennandi breyt, har rættiliga lætt er at yvirhála og nógvum avbjóðandi støðum, og veðrið, ið nærum altíð er svikaligt, er hetta yndisbreytin hjá flestu formil 1 koyrarum og somuleiðis áskoðarum. Men í tey 44 umførini, ið koyringin vardi hendi nærum einki. Nakrir smáir nærdystir vóru aftarliga í feltinum, men ikki nakað at tala um, ja sjálvt veðrið helt sær hampiligt alla koyringina.

## Úrslit fyri belgisku formil 1 koyringina

| Úrslit | Koyrari | Lið | Tíð | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kimi Räikkönen | Ferrari | 1:20:39.066 | 10 |
| 2 | Felipe Massa | Ferrari | +4.6 sekund | 8 |
| 3 | Fernando Alonso | McLaren-Mercedes | +14.3 sekund | 6 |
| 4 | Lewis Hamilton | McLaren-Mercedes | +23.6 sekund | 5 |
| 5 | Nick Heidfeld | BMW | +51.8 sekund | 4 |
| 6 | Nico Rosberg | Williams-Toyota | +76.8 sekund | 3 |
| 7 | Mark Webber | Red Bull-Renault | +80.6 sekund | 2 |
| 8 | Heikki Kovalainen | Renault | +85.1 sekund | 1 |
| 9 | Robert Kubica | BMW | +85.6 sekund | |
| 10 | Ralf Schumacher | Toyota | +88.5 sekund | |
| 11 | Jarno Trulli | Toyota | +103.653 sekund | |
| 12 | Vitantonio Liuzzi | STR-Ferrari | +1 umfar | |
| 13 | Rubens Barrichello | Honda | +1 umfar | |
| 14 | Adrian Sutil | Spyker-Ferrari | +1 umfar | |
| 15 | Takuma Sato | Super Aguri-Honda | +1 umfar | |
| 16 | Anthony Davidson | Super Aguri-Honda | +1 umfar | |
| 17 | Sakon Yamamoto | Spyker-Ferrari | +1 umfar | |
| - | Jenson Button | Honda | Tøkniligur trupulleiki | |
| - | Alexander Wurz | Williams-Toyota | Tøkniligur trupulleiki | |
| - | David Coulthard | Red Bull-Renault | Tøkniligur trupulleiki | |
| - | Sebastian Vettel | STR-Ferrari | Tøkniligur trupulleiki | |
| - | Giancarlo Fisichella | Renault | Tøkniligur trupulleiki | |

**HM fyri bilførarar**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | Ongland | McLaren-Mercedes | 97 stig |
| 2 | Fernando Alonso | Spania | McLaren-Mercedes | 95 stig |
| 3 | Kimi Räikkönen | Finland | Ferrari | 84 stig |
| 4 | Felipe Massa | Brasilia | Ferrari | 77 stig |
| 5 | Nick Heidfeld | Týskland | BMW | 56 stig |
| 6 | Robert Kubica | Póland | BMW | 33 stig |
| 7 | Heikki Kovalainen | Finland | Renault | 22 stig |
| 8 | Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 17 stig |
| 9 | Nico Rosberg | Týskland | Williams-Toyota | 15 stig |
| 10 | Alexander Wurz | Eysturríki | Williams-Toyota | 13 stig |
| 11 | Mark Webber | Avstralia | Red Bull-Renault | 10 stig |
| - | David Coulthard | Skotland | Red Bull-Renault | 8 stig |
| 13 | Jarno Trulli | Italian | Toyota | 7 stig |
| 14 | Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 5 stig |
| 15 | Takuma Sato | Japan | Super Aguri-Honda | 4 stig |
| 16 | Jenson Button | Ongland | Honda | 2 stig |
| 17 | Sebastian Vettel | Týstkland | STR-Ferrari | 1 stig |

**HM fyri lið**

| | | |
|---|---|---|
| 2 | Ferrari | 161 stig |
| 3 | BMW | 90 stig |
| 4 | Renault | 39 stig |
| 5 | Williams-Toyota | 28 stig |
| 6 | Red Bull-Renault | 18 stig |
| 7 | Toyota | 12 stig |
| 8 | Super Aguri-Honda | 4 stig |
| 9 | Honda | 2 stig |
| - | STR-Ferrari | 0 stig |
| - | Spyker-Ferrari | 0 stig |
| - | McLaren-Mercedes * | |

** McLaren-Mercedes eru kolldømdir úr kappingini fyri lið, tí liðið hevur njósnast. Liðið tekur stig í kappingini um HM frá kappingarneytunum, men tey telja ikki við fyri McLaren.*